# Yvirtaka eina rúmliga fólkakirkju

**-Fólkakirkjan hevur verið rúmlig og átt pláss fyri øllum. Tað er ta rúmligu fólkakirkjuna, ið vit nú hava flutt undir føroyskt málsræði. Mín vón er, at kirkjan framhaldandi fer at hava orku og dirvi at boða kristna boðskapin á ein livandi, viðkomandi og tíðarhóskandi hátt segði løgmaður á samkomu í Norðurlandahúsinum sunnudagin. Vit prenta røðuna**

*Myndir: Jens Kristian Vang*




*Jóannes Eidesgaard, løgmaður vónaði at góða samstarvið millum kirkjuna og landsins myndugleikar fór at halda fram eftir yvirtøkuna*

## Háttvirda samkoma

Tað eru allar orsøkir til at hátíðarhalda, at kirkjan, hóast hon sum kirkja leingi hevur verið roknað sum føroysk, er komin undir føroyskt málsræði saman við trúarsamfeløgum annars. Tá ið løgtingið varð sett fyri løtu síðani, frøddist eg um, at henda yvirtøkan er gjørd í fullari semju í politisku skipanini við einmæltari samtykt í løgtinginum. Í politiska verkinum er tað eins og í okkara gerandisdegi nógv, ið spjaðir og skilir. Tað hevur tí týdning í grundleggjandi málum sum hesum, at vit geva okkum stundir og gera okkum ómak at finna neyðugu semjurnar. Fólkakirkjan er samfelagsberandi stovnur, ið flestu okkara hava tilknýti til og virðing fyri.

Fyrireikingarnar til yvirtøkuna av fólkakirkjuni byrjaðu í 1998 og hóast semja ikki hevur verið um allar lutir, hevur semja valdað um at flyta kirkjuna í føroyskt høpi uttan at skala hennara bygnað og uttan at politiski myndugleikin skal gerast meira eyðsýndur partur av innara lívi kirkjunnar. Eg eri fullvísur í, at bæði sitandi og komandi landsstýri fara at umsita sínar nývunnu heimildir við varsemi og virðing fyri sjálvstøðu kirkjunnar.

Semjan millum politisku skipanina og kirkjuliga landslagið í Føroyum um ikki at fremja broytingar í sambandi við yvirtøkuna hevur helst verið orsøkin til, at almenna orðaskiftið um kirkjuna hevur verið tamt. Vit hava áður sæð, eitt nú á skúlaøkinum, at orðaskiftið gerst bæði livandi og viðkomandi, tá ið ábyrgdin fyri einum málsøki er okkara.

Einstøk viðurskifti um skipan kirkjunnar hava tó vakt áhuga, m.a. leikluturin hjá drotningini og spurningurin, hvørt landsstýrismaðurin, ið varðar av kirkjuni, skal vera limur í henni.

Sum løgmaður havi eg sjálvandi lagt mær í geyma, at bæði meirlutin og minnilutin í løgtingsins mentamálanevnd siga seg taka undir við ella hava forstáilsi fyri sjónarmiðnum um, at landsstýrismaðurin í kirkjumálum eigur at vera limur í fólkakirkjuni. Sum kunnugt forðar stýrisskipanin fyri, at hetta verður lógarfest. Sjónarmiðið verður ivaleyst havt í huga, tá ið komandi samgongur skipa seg eftir løgtingsval.

Eg vil tó loyva mær at leggja afturat, at javnvágin millum myndugleikar og kirkju krevur varsemi og ábyrgd av báðum pørtum. Havandi í huga, at landsstýrismaðurin í mentamálum – og í ávísan mun løgmaður – skulu umsita kirkjuligu lóggávuna í neyvum samráð við og hoyring av kirkjuligum pørtum, ivist eg í, um tað er rætt at flyta eitt søguliga treytað danskt grundlógarkrav um støðuna hjá monarkinum í eina nútíðar føroyska kirkjulóggávu. Hvørki landsstýrismaðurin ella løgmaður verða, og teir skulu heldur ikki verða, ein ovasti kirkjuligur leiðari, ið skal gera av trúar- og læruspurningar.

Eg fari at takka Jógvani á Lakjuni, landsstýrismanni, og embætisfólki hansara fyri væl avrikað verk og fyri í góðum samstarvi við umboð fyri kirkjuna og kirkjuráðini, politisku skipanina og fylgibólkarnar, sum eg hervið eisini takki, at hava greitt setningin um at taka yvir fólkakirkjuna og tey frá henni víkjandi trúarsamfeløg.

Jeg vil også benytte lejligheden til på landsstyrets vegne at takke kirkeminister Bertel Haarder og hans embedsmænd for et godt og konstruktivt samarbejde i forbindelse med overtagelsen af den færøske folkekirke. Kirkeministerens tilstedeværelse i dag samt underskrivelsen af en samarbejdsaftale mellem færøske og danske kirkemyndigheder er udtryk for, at selv om lovgivningsmyndigheden, administrationen, finansieringen og ansvaret for kirken nu overføres til færøske myndigheder, så forsætter de tætte og gode relationer mellem den danske og færøske folkekirke. Jeg vil også gerne udtrykke vores glæde over, at repræsentanter for de andre nordiske kirker er til stede i dag for sammen med os at markere overførslen af kirkelige anliggender til færøske myndigheder.

Fólkakirkjan hevur í øldir verið ein mentanarberi og eitt friðskjól hjá føroyingum, har teir stillførir kundu lýða á boðskapin og sáttast við bæði gerandisdagin og hin alvalda. Framhaldandi er fólkakirkjan ein týðandi súla í føroyska samfelagnum og í verðsligu tíðini, vit liva í, er stórur tørvur á at gera vart við onnur virði enn tey, sum stava frá peningi, partabrøvum og frívirði í húsunum.

Fólkakirkjan hevur verið rúmlig og átt pláss fyri øllum. Tað er ta rúmligu fólkakirkjuna, ið vit nú hava flutt undir føroyskt málsræði. Mín vón er, at kirkjan framhaldandi fer at hava orku og dirvi at boða kristna boðskapin á ein livandi, viðkomandi og tíðarhóskandi hátt. Verður boðanarfrælsið nýtt til at spíska boðskapin, bjóða okkum av, eggja okkum til, seta spurnartekin við okkara sjálvgóðsku og regluliga minna okkum – kanska serliga okkum, ið sita í valdum umboði – á okkara skyldur mótvegis okkara medmenniskjum, fáa vit eina spennandi fólkakirkju.

Í vónini um at góða samstarvið millum kirkjuna og landsins myndugleikar heldur fram, fari eg at ynskja føroysku kirkjuni blíðan byr segði Jóannes Eidesgaard løgmaður.



*Kórsangarar gjørdu løtuna sera hátíðarliga*




*Jógvan Fríðriksson, prestur, talar*




*Jákup Reinert Hansen, prestur talar*



*Hans Jákup Joensen, biskuppur talar*